Monica aftur fyri skotum

Tey flestu munnu minnast svenska ráðharran Monicu Sahlin, sum fyri nøkrum árum síðani var fyri hvøssum atfinningum, tí hon hevði brúkt sítt almenna kredittkort til at rinda privatar rokningar

Hon gav tá stjórnini lyfti um, at slíkt skuldi ikki henda aftur, men nú er komið fram, at hon gjørdi tað sama fyri einum góðum mánað síðani. Tað var tann 15. juli, at hon rindaði við almenna kredittkortinum, tá hon í summarfrítíð síni hevði verið á einari matstovu og fingið sær ein bita.

Eisini er komið fram, at hon leigaði tveir hýruvognar í summarfrítíðini og rindaði við almenna kreditkortinum.

Monica Sahlin hevur alment viðgingið, at hetta var eitt mistak, og nú lovar hon, at hon fer at taka annað skinn um bak.

Reglurnar við teimum almennu kredittkortunum hjá svenskum ráðharrum eru annars greiðar. Kortini skulu einans brúkast til at rinda útreiðslur, sum ráðharrarnir hava av almennum uppgávum.

Men tað er ikki einans misnýtslan av kredittkortinum, sum hevur drigið Monicu Sahlin fram í ljósið. Herfyri kom fram, at hon hevði fingið ólagt at rinda írestandi skatt, men at hon ongantíð hevur goldið rokningina.

Mistak orsøk til flogvanlukku

Í Miðeystri vilja keldur vera við, at tað var eitt mistak hjá flogskiparanum, sum var atvoldin til, at Air Bus-flogfarið hjá Gulf Air niður í Peraflógvan mikukvøldið. Øll tey 143 umborð lótu lív

Tað eru fleiri av teimum smáu statunum við Persaflógvan, sum eiga flogfelagið Gulf Air, og í gjár visti sjónvarpið í Abu Dhabi at siga, at vanlukkan stóðst av einum mistaki hjá flogskiparanum.

Víst varð á, at flogskiparin royndi tríggjar ferðir at seta flogfarið á lendingarbreytina uttan fyri høvuðsstaðin í Bahrain, Manama. Sambært sjónvarpinum gjørdi flogskiparin eitt mistak, tá hann royndi fyrstu ferð, og annar vongurin á flogfarinum fekk ein stoyt. Kanska bar vongurin við sjógvin, segði sjónvarpið.

Tá flogfarið triðju ferð royndi at sleppa ímóti floghavnini, misti tað javnvágina, eldur kom í, og flogfarið datt niður á sjógvin tætt uttan fyri strondina.

Teir báðir svørtu kassarnir í flogfarinum vórðu funnir stutt eftir vanlukkutilburðin, og teir kunnu kanska svara spurninginum, hvat veruliga hendi.

Norðmenn spæla klassiskt

Í komandi viku fáa vit vitjan av norsku sangarinnuni Liv Oddveig Midtmageli og pianistinum Ingo Schauser.

Tey fara at hava tríggjar konsertir á túrinum. Í Skála skúla sunnudagin 27 aug. kl. 16:00, í Listaskálanum í Tórshavn, týsdagin 29. aug. kl. 19.30 og at enda í Trongisvágs skúla hósd. 31. kl. 19.30.

Skráin er prýdd við norðurlendskum sangperlum eftir Carl Nielsen, Grieg, Sibelius o.fl. Ingo spælir harafturat eitt solostykki Tema við variationónum eftir Carl Nielsen.

Liv Oddveig er norsk og hevur studerað sang víða hvar, í Noreg, Onglandi, Svøríki og í Danmark, har hon tók diplomeksamiu á "det fynske Musikkkonservatorium" við góðum ummælum í fjør.

Ingo Schauser er føddur í Flensborg og uppvaksin bæði í Týsklandi og í Spanien. Ingo hevur eins og Liv lært víða hvar, nevnast kann París, Rom, Italien og Danmark hagar hann tók diplom eksamiu í 1997, eisini á Fjóni.

Tey bæði Liv og Ingo hava spælt saman í eitt ár og hava fingið sera góð ummæli frá donskum kritikarum.

"Man fik skiftevis kriller i maven og klump i halsen", sigur ummælarin í danska blaðnum Politiken, meðan Fyns Stiftti-dende skrivar: "Det er intet mindre end et lynnedslag af musikalsk energi".

Yvirgangsmenn umborð á „Kursk“

Russisku myndugleikarnir hava gjørt av at kanna tilburðin við kavbátinum „Kursk“ sum eitt brotsverk, og leiðarin í trygdartænastuni FSB sigur, at kanska vóru yvirgangsmenn umborð á kavbátinum lagnutúrin í Barentshavinum

Nikolaj Patrusjev, trygdartænastuovasti kom í gjár til Murmansk, eftir at myndugleikarnir hava fingið illgruna um, at yvirgangsmenn vóru við hendan seinasta túrin hjá kavbátinum „Kursk“, og at tað vóru teir, sum søktu kavbátin. Málið verður tí roknað sum brotsverk, og tí eru tað russiski ríkisadvokaturin og trygdartænastan, sum í felag skulu kanna umstøðurnar.

Seinastu dagarnar hava russisku tíðindatænasturnar borið ymisk tíðindi um, hvat veruligahendi umborð á kavbátinum. Summi halla til frágreiðingina um, at kavbáturin sakk eftir ein samanstoyt við ein fremmandan kavbát, meðan onnur halda, at talan var um eina yvirgangsatsókn.

Samband við Kekenia?

At talan kanska var um eina yvirgangsatsókn, kom fyrstu ferð fram í russiskum fjølmiðlum hósdagin, og seinni váttaði FSB-ovastin, at málið nú verður kannað sum eitt úrslit av yvirgangi.

Patrusjev sigur, at tveir av teimum 118 monnunum umborð á „Kursk“ kunnu hava verið yvirgangsmenn. Talan er um tveir menn úr Dagestan, og nú verður roynt at kanna, um teir kunnu hava havt tilknýti til onkran víðgongdan felagskap í gamla sovjetlýðveldinum. Sambært Petrusjev hoyrdu teir báðir menninir ikki til ta føstu manningina á kavbátinum, men meiri vildi hann ikki siga um teir báðar.

Dagestan hevur mark við Kekenia, har russiskir hermenn framvegis eru í kríggi við uppreistrarmenn. Kekenar hava fleiri ferðir í seinastuni hótt við at flyta kríggið inn um russiska markið, og m. a. verður hildið, at tað vóru kekenskir yvirgangsmenn, sum skipaðu fyri einari bumbuspreinging í Moskva herfyri.

Vladimir Putin, forseti hevur sagt, at vísir tað seg, at onkur skipaði fyri vanlukkuni við „Kursk“, skulu teir seku finnast og revsast.

bobcat -maskinurnar sum halda!
• Gravmaskinur –*nógv model*
• Lessarar við óteljandi møguleikum!
Vælegnaðar til byggivirkir, entrepenørar, bøndir, jarðarbrúk o.a.

Keyp góðsku – keyp Bob Cat!
Kaj Andreasen & Co
Sandvíkarhjalli - Tel. 315600 - Fax 318008
Sosialurin - 311820

Hjá okkum fáast vognar og útgerð til allar flutningsuppgávur!
• Viðfestisvognar sum lasta frá 325 kg. upp til 2.600 kg. –nógv model!'
• Eykalutir til viðfestisvognar
• Sekkjavognar, hydr. lyftiborð –arbeiðsbord
• Vognar til gassfløskur, oljutunnur, kassar, trappir –óteljandi møguleikar!
• Gafflar til heisan av plattum, vøru o.a.
• Tip - Ruskkonteinarir til trukkar
• Spennireimar og lyftistroppar
• Sleipikrókar til øll bilmerki!
Tosið við okkum!
Kaj Andreasen & Co
Sandvíkarhjalli - Tel. 315600 - Fax 318008
Sosialurin - 311820

Upplýsing bannað

Umsitingin í landsstýrinum kann ikki spyrja seg fyri hjá altjóða stovnum um mannagongdir. Tað staðfestir, at føroyingar ikki hava nakra støðu sum fólk. Sjálvt saklig upplýsing er bannað. Men at føroyskir politikarar eisini tekna eina skeiva og niðurgerandi mynd av virkseminum hjá ST, er beinleiðis villleiðandi og lítið virðiligt mótvegis øðrum tjóðum.

At virða onnur, er fortreytin fyri at virða seg sjálvan. Og at virða seg sjálvan, er fortreytin fyri at virða onnur.

Tað er í fínasta ordan, at fólk eru ósamd um fullveldismálið. Men upplýsing eigur at gagna øllum pørtum, um ein heldur seg hava eina erliga og góða søk.

Tað er eisini í fínasta lagi, at andstøðuleiðarar finnast at landsstýrinum. Men atfinningarnar mugu byggja á veruleikan. Annars gerast tær villleiðing.

Niðurgera aðrar tjóðir

Í hesum føri er tað sera harmiligt, at atfinningarnar byggja á eina sera lítla virðing fyri okkum sjálvum og fyri ST – Sameindu Tjóðum. Og sostatt vísir hetta sera lítla virðing fyri øðrum fólkum og tjóðum.

Ein mynd verður málað av ST sum ein stovnur, ið bert starvast við kríggjum og bardøgum í tí sonevnda "triðja heiminum". Hvør skal siga: Hatta eru bara tey "óútviklaðu" sum vit ikki kunnu samanbera okkum við. Vit hava nóg mikið í okkum sjálvum her í tí danska ríkinum. Fólkarættur er ikki fyri okkum. Danmark veit meira um demokrati og fólkarætt enn Sameindu Tjóðir.

ST og fiskimarkið

Hetta er vandamikið og hevur onki við upplýsing at gera. ST er einasti heimsumfatandi stovnur, ið starvast burturav við at skipa javnstøðu og góð viðurskifti millum fólk. ST og tess deildir brúka meginpartin av síni orku uppá onnur viðurskifti, enn tey kríggini, vit hoyra um í tíðindunum. At berjast móti fátækradømi.

At berjast móti fremmandahatri og rasuskilnaði. At menna kunningartøkni fyri øll. At hava greiðar reglur fyri havrætti og hvussu fólk sleppa at troyta egið náttúrutilfeingi.

ST savnar tær royndir og skipar tær spælireglur sum eru fyri at loysa ósemjur á virðiligan hátt. Eisini millum tey lond, ið vit rópa "framkomin". Tá føroyska fiskimarkið fór út á 200 fjórðingar, var hetta úrslit av arbeiði og viðtøkum í ST. Stovnurin viðger dagliga mál, sum kunnu samanberast við okkara samráðingar við donsku stjórnina, og fær túsundtals brøv og fyrispurningar um dagin.

Fólkarættur er fyri øll

Hóast fleiri politikarar siga seg ikki vilja, at føroyingar verða viðurkendir sum fólk og harvið koma undir tær reglur og siðvenjur, sum skapast í altjóðarætti, so eiga vit ikki at niðurgera onnur fólk og arbeiðið hjá ST.

Fólkarættur er fyri øll. Rík sum fátæk. Kvinnur sum menn. Ung sum gomul. Litt sum hvít.

Tað eigur eftir mínum tykki eisini at gerast okkara rættur. Og harvið eisini okkara ábyrgd at skapa ein betri heim.

Høgni Hoydal

»Ein nordschleswiger« størri virði enn ein føroyingur?

Á týskum nevnast teir »Nordschleswigern«, í Suðurjútlandi nevnast teir »hjemmetyskere«, á føroyskum týski minnilutin í Suðurjútlandi. Hesi kunnu fegnast um ein stóran sigur uppá rokning føroyinga. Hesir kunnu nú fara inn á hvørja umsitingarliga skrivstovu í Søndar-Jyllands amt og blíva avgreiddir á týskum, meðan tað nokk bara er á Oyrasundskollegiinum, at ein kann blíva avgreiddur á føroyskum!

Danska stjórnin hevur trumfað sáttmálan um evropeisk minnilutamál ígjøgnum. Týski minnilutin uppá uml. 30.000 fólk, ið deilir móðurmál við yvir 90 milliónir týskarar, eysturríkarar og sveitsarar (vorðið sum hótt mál!) fekk sín vilja. Hetta er sjálvandi gleðiligt fyri teir, men sæð í søguligum baksýni virkar avgerðin hjá donsku stjórnini marghátlig. Hampamaðurin Bertil Haarder tók einaferð rívan til: »Så læs dog for p..... jeres historie!« Og vit taka Haarder uppá orðið.

Søguligt baksýni

Í 1993 var undirritaði á háskúla hjá IM og KFUM í Hoptrup, ið liggur skamt norðanfyri týska markið. Háskúlin var stovnaður í 1921 fyri at so mangir danir í Suður-Jútlandi sum gjørligt skuldu fáa høvi at læra at skriva og lesa danskt. Árini 1864-1920, tá Suður-Jútland var ogn hjá týskum, var tað strangliga bannað og revsivert at læra fólkið danskt (hvar finna vit eitt líknandi dømi í júst sama tíðarskeiði?) Í stóru uppihaldsstovui á Hoptrup Højskole vóru allar valplakatirnar – bæði danskar og týskar – frá fólkaatkvøðuni í 1920, tá »Sønder-Jylland blev stemt hjem!« Har vóru eisini málningar, ið lýstu týsku kúganina av suðurjútlendingum frá 1864, tá danir taptu ímóti týskinum við Dybbøl fram til 1920, tá Christian X (hann sjálvur, ið á sinni sendi løgtingið heim) á sínum hvíta hesti reið suður um gamla markið og inn í Sønderjyllands amt. Hetta var sera rørandi og hugtakandi hjá einum føroyingi at skoða, men kendist tað samstundis eitt sindur øvugt, tá ið ein hugsar um málstríðið heima á klettunum um sama mundið.

Minnisvarðar!

Víða hvar í Suðurjútlandi eru eisini minnisvarðar um teir uml. 6.000 suðurjútlendingarnar, ið lótu lív í fyrra heimsbardaga 1914-18. Hesir blivu saman við túsundtals øðrum ímóti sínum vilja tvungnir upp í týska herin at berjast ímóti fraklendingum og bretum á vesturhermótinum. Tað ironiska er, at júst sigurin hjá hesum týskinum gjørdi tað møguligt hjá Suðurjútlandi at blíva sameint við Danmørka ftur. Álagt varð suðurjútlendsku hermonnunum, at alt samskifti á hermótinum skuldi fara fram á týskum; tann hermaður, ið mælti danamál, bleiv revsaður á staðnum. Týski herflotin valdi eisini at møta bretska flotanum í farvatninum vestan fyri Suðurjútland í 1916. Har fór fram tann størsi sjóbardagin nakrantíð. Í Haderslev er eisini minnisvarðin um teir 4 donsku hermenninar, ið lótu lív í stutta bardaganum ímóti týskinum morgunin 9. apríl 1940. Ta ferðina bleiv alt Danmark hertikið í samfull 5 ár. Og »hjemmetyskere« vóru ikki hinum týskarunum óhollir í ráðum.

Marghátligt

Tað, sum er so marghátligt við avgerðini hjá donsku stjórnini er, at vit í Føroyum hava ongantíð verið við til at kúgva danska málið. Heldur hava vit sað uppá tað sum lykilin til alt samskifti við skandinaviska meginlandið. Vit eru eisini »large« við danir, búsettir í Føroyum, og flestir teirra samskifta við okkum á sínum móðurmáli, meðan t.d. flestu danir, ið eg møtti í Svøríki og Noregi, høvdu lært seg svenskt og norskt. Er tað hinvegin nakað tungumál, ið hevur verið ímyndin av kúganini av danska málinum, so hevur tað verið týskt. Tí er tað – sað við søguligum baksýni – sera marghátligt, at danska stjórnin vil tekkjast máli teirra, ið hava kúgað teirra, og samstundis ikki geva føroyskum sømdir sum tjóðarmál føroyinga. Men tað eru so fá, ið tíma at lesa uppá søguna.

H. Á. Simonsen

N.B. Finnar og íslendingar eru dragnaðir nógv í norðurlendskum samstarvi, tí mangir teirra løgdu svenskt og danskt á hillina. Lat okkum – fullveldi ella ikki – varðveita frálæruna í donskum, sum eisini er lykilin til svenskt og norskt. Men fyrst og fremst má føroyskt fáa status sum tjóðarmál og ikki sum »landspartamál« ella »minnilutamál«.

ÚTSØLA
byrjar í máling & gólv mánadagin kl. 13.00
MÁLING
Restgoymsla av uttanduramáling umframt veggjamáling
TAPET
Restir av tapet og bordum
GÓLV Vinylrestir
Teppir 198 kr. fyri meturin (4 m. breitt)
máling & gólv
Við Landavegin • Tórshavn
Tel. 31 60 66
Sosialurin - 311820